Umboð fyri Oljumálaráðið í Aberdeen:

# Vitjaðu BP og Føroya Kolvetni



*Landsstýrismaðurin í oljumálum og aðalstjóri hansara á vitjan á skrivstovuni hjá Føroya Kolvetni í Aberdeen. Á myndini eru eisini starvsfólkini á skrivstovuni*
*Mynd Jan Müller*

OLJUMESSA
*Jan Müller*
*jan@sosialurin.fo*

Tá oljumessan varð hildin í Aberdeen herfyri nýttu landsstýrismaðurin í oljumálum, Eyðun Elttør, og aðalstjórin í Oljumálaráðnum, Herálvur Joensen høvi til at vitja tvey oljufeløgunum, sum hava leitiloyvi í Føroyum. BP og Føroya Kolvetni høvdu boðsent teimum báðum fyri at greiða frá teirra kanningum og støðuni í løtuni og somuleiðis fyri at vita, hvat Oljumálaráðið ætlar í framtíðini. Prátað varð so eisini um, hví leitimodellini ikki riggaðu og hvørjir eru møguleikarnir fyri framman. Sosialurin skilur, at eitt nú BP sær ikki so stórar møguleikar í sínum leitiøki í løtuni, men at kanningar í framtíðini skulu gera hetta meira greitt.

Á fundinum við Føroya Kolvetni vóru føroysku umboðini víst runt á nýggju skrivstovuni í Aberdeen. Hon liggur í einum sera hugnaligum umhvørvi í býnum. Har fingu tey eisini meira at vita um arbeiðið og ætlaninar hjá Føroya Kolvetni bæði í føroyskum og í bretskum øki. Føroya Kolvetni vildi so eisini vita, hvussu Oljumálaráðið sær fyri sær framtíðina á landgrunninum.

Tað skilst, at myndugleikarnir vilja hava, at feløgini sum hava brunnar eftir at bora royna at gera tær kanningar, sum eru neyðugar fyri antin at kunna finna rætta staðið at bora ella fyri at staðfesta, at einki er at fara eftir. Og um so er hvussu og hvar teirra boriforpliktilsi tá kunnu setast í verk.

Tað er greitt, at føroyskir myndugleikar, tó at teir vilja lurta eftir oljufeløgunum, eisini vilja fasthalda feløgini til at gera neyðugu kanningarnar, eitt nú við atliti til at bora djúpar brunnar, nú grynru prospektini ikki vístu seg at vera áhugaverd.

Tað er tí meiri seismikkur, sum skal til fyri at kortleggja eitt nú dey djúpri løgini í teim ymsu loyvunum.

Eftir tí Sosialurin veit er annar av brunnunum hjá BP sera djúpur, møguliga djúpri enn 5000 metrar.

Tað skilst á keldum blaðið hevur tosað við, at ein møguleiki kann verða at leggja brunnar saman, soleiðis at ístaðin fyri at bora tveir grunnar brunnar heldur at bora ein ultradjúpan brunn. Hetta eru tó enn bara spekulatiónir. Tað hevur ikki eydnast okkum at fáa hetta váttað hjá hvørki oljufeløgum ella myndugleikum, men millum oljufólk, sum Sosialurin hitti á oljumessuni í Aberdeen verður sagt, at hetta er als ikki óvanligt í øðrum leitiøkjum. Tvs. at samarbeitt verður tvørtur um lisens- og bólkamørk fyri harvið at minka um váðan, har tað verður neyðugt at gera nógv størri íløgur í ein djúpri brunn t.d.

Í hesum sambandi verður sera áhugavert at frætta um úrslitið hjá Shell og BP á Ben Nevis prospektinum har norðuri í bretskum øki. Har hava teir m.a. borað gjøgnum basalt, sum er av sama slag sum tað, ið finst á okkara landgrunni.




*Hjarnar Djurhuus, BP-stjóri her á stóra básinum hjá BP á oljumessuni í Aberdeen*
*Mynd Jan Müller*



**UTTAN ÚR HEIMI**

# USA stuðlar krígsharrum sum fremja yvirgang

**Fleiri av teimum afghansku krígsharrunum, sum hjálptu USA at fella Taliban-stýrið, fáa framvegis stuðul úr USA, sjálvt um teir gera seg inn á sivilfólkið.**

YVIRGANGUR
*Árni Joensen*
*fartekst@mail.dk*

Mannarættindafelagsskapurin Human Rights Watch rópar aftur varskó, og enn einaferð snýr tað seg um Afghanistan.

Felagsskapurin sigur í einari nýggjari frágreiðing, at teir sonevndu krígsharrarnir, sum hjálptu amerikanarunum at koyra stýrið hjá Taliban frá, gera seg inn á afghanska sivilfólkið. Human Rights Watch sigur, at hermenn hjá krígsharrunum burturflyta menn og krevja loysigjald fyri at lata teir leysar, kvinnur og ungar gentur verða neyðtiknar, og hermenninir krevja pengar frá handilsmonnum og øðrum aftur fyri at verja teir.

Mannarættindafelagsskapurin krevur tí, at amerikanska stjórnin skal steðga øllum stuðuli til krígsharrarnar, sum framvegis fáa amerikanskan stuðul aftur fyri hjálpina í krígnum við Taliban-stýrið.

Human Rights Watch vil eisini vera við, at afghanska løgreglan stendur lítið aftan fyri krígsharrarnar. Felagsskapurin vil vera við, at løgreglumenn gera seg eisini inn á sivilfólkið, og at teir halda seg heldur ikki aftur, tá tað snýr seg um at neyðtaka kvinnur.

Mannarættindafelagsskapurin sigur seg hava prógv fyri, at ráðharrar í afghansku stjórnini eru vitandi um yvirgangin, men at teir látast sum einki.

# Grimdarregn



*Seinastu dagarnar hevur tað regnað sera illa í kubanska høvuðsstaðnum Havana. Hesin drongurin hevur funnið sær eitt heldur óvanligt akfar, sum tó tykist vera væl egnað til slíkt veður.*

# Iran-gølan kostaði stjórastarvið

**Olav Fjell, sum hevur verið stjóri í Statoil seinastu fýra árini, noyddist frá orsakað av Iran-gøluni.**

STATOIL
*Árni Joensen*
*fartekst@mail.dk*

Klokkan hálvgum tvey gjáranáttina mátti máttmesti maðurin í norska vinnulívinum, Statoil-stjórin Olav Fjell, stinga í sekkin, eftir at hann og nevndin vóru komin ásamt um, at tað var best fyri felagið, at hann fór frá.

Orsøkin er tann sokallaða Iran-gølan, sum kom í, tá tað varð avdúkað, at Statoil hevði verið uppi í sera ivingasomum arbeiði í Iran, og at felagið kanska hevði nýtt mutur fyri at sleppa fram at iransku oljuvinnuni.

- Hetta er ein tungur dagur, men eg eri samdur við nevndini, at hetta er tað besta fyri felagið, segði Olav Fjell við tíðindafólk aftan á fundin.

Men Statoil-stjórin fór ikki tómhentur avstað. Sambært setanartreytunum fær hann tvær árslønir ella umleið hálva áttandu milliónir krónur, nú hann fer frá.

## Bush missir undirtøku

Alt færri og færri amerikanarar siga seg vera nøgdar við arbeiðið hjá George W. Bush, forseta, og forsetin hevur ongantíð havt so lítla undirtøku sum nú.

Sambært sjónvarpinum CNN og blaðnum USA Today halda júst 50 prosent av amerikanarunum, at avrik forsetans eru í lagi. Tað er munandi minni enn fyri einum hálvum ári síðani, tá ein kanning vísti, at 71 prosent av fólkinum vóru nøgd við arbeiði forsetans.

CNN hevur eisini kannað, hvønn møguleika tey demokratisku valevnini hava at vinna forsetavalið ímóti Bush næsta heyst. Kanningin vísir, at fyrrverandi generalurin Wesley Clark hevur bestu møguleikarnar av teimum demokratisku valevnunum. Tað hava aðrar kanningar eisini víst.

## Kann ikki ríka uran

Tá kanningarmenn hjá altjóða kjarnorkunevndini IAEA vóru í Iran í síðsta mánað, funnu teir tekin um, at iranar høvdu ríkað uran á einum kjarnorkuverki í Natanz. Tað fekk IAEA at halda, at iranar eru førir fyri at ríka uran, ið kann nýtast til at gera kjarnorkubumbur við.

Men nú siga iransku myndugleikarnir, at landið er ikki ført fyri at ríka uran. Iranski umboðsmaðurin í IAEA, Ali-Akbar Salehi, sigur við týsku tíðindastovuna DPA, at funnu kanningarmenninir hjá altjóða kjarnorkunevndini ríkað uran á verkinum í Natanz, so er talan um innflutt ríkað uran.

Altjóða kjarnorkunevndin hevur leingi strongt á iransku myndugleikarnar fyri at fáa teir at loyva kanningarmonnunum at rannsaka landsins kjarnorkuverk, og fyrradagin segði Mohsen Aminzadeh, varainnanríkisráðharri, at IAEA kann sleppa at kanna verkini, og at ongar forðingar skulu darva kanningarmonnunum.

## Viðgekk hópdráp

Ein fyrrverandi bosniaserbiskur heryvirmaður hevur nú viðgingið, at hann var uppi í tí herviliga hópmorðinum í biosniska býnum Srebrenica í 1995.

Momir Nikolic viðgekk fyri dómstólinum í Haag, at hann og menn hansara høvdu fingið boð um at kringseta Srebrenica ein morgunin í juli í 1995. Teir høvdu fingið boð um at skilja allar menninar frá kvinnunum, og yvirmenn hansara høvdu greitt sagt, at allir muslimskir menn í býnum skuldu takast av døgum, greiddi hann dómstólinum frá.

- Vit fingu greið boð um at skilja menninar frá kvinnunum og børnunum. Síðani skuldu vit steingja teir inni og beina fyri teimum, segði Momir Nikolic. Hópdrápið í Srebrenica kostaði meiri enn 7.000 muslimskum monnum lívið.

## Funnið nógvar fornlutir

Síðani í mai hava norskir fornfrøðingar leitað eftir fornlutum í Aukra, og higartil hava teir funnið umleið 100.000 ymiskar fornlutir har

Verlætlanin er ein tann størsta í Noregi nakrantíð og varð sett í verk, tí ein gassleiðing frá Ormen Langeleiðini til lands skal leggjast ígjøgnum økið. Leiðingin kemur at órógva fleiri friðað øki, og tí hava oljufeløgini játtað næstan 70 milliónir krónur til tær fornfrøðiligu rannsóknirnar.

Norsku fornfrøðingarnir siga seg hava fingið nógv burturúr, og teir hava funnið ein hóp av sera áhugaverdum lutum. Tann elsti er frá umleið árinum 9000 fyri Kristi føðing, og fornfrøðingarnir eru komnir fram á tólv eldstaðir. Umleið 60 fólk eru við í arbeiðinum í Aukra.